Skála-NSÍ:

# Báðir partar er leikbannaðir

**Hjá Skála, sum hevur trý leikbann, er tað kærkomið, at Pauli G. Hansen er um at vera tøkur aftur, og hjá NSÍ er ein miðvallari leikbannaður fyri triðju ferð**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



Tey bæði liðini, sum bresta saman á Skála í morgin, eru eyðkend av, at tað tær seinastu vikurnar ikki hevur gingið nakað serligt hjá teimum, Síðani summarsteðgin hevur Skála í sjey dystum fingið tíggju stig. Fýra tær seinastu ferðirnar hevr úrtøkan bara verið fýra stig. Enn er tað upp til Skála at gera av, um teir skulu vinna fyrsta settið av heiðursmerkjum nakrantíð.

Fyritreytirnar eru einki serligar, áðrenn kommunufelagarnir hinumegin fjørðin í morgin koma at vitja. Skálamenn hava síðstu tíðina verið nógv plágaðir av leikbannum, og soleiðis er tað eisini í morgin. Iulian Florescu er leikbannaður fyri triðju ferð í ár, og Nenad Stankovic og Bárður Danielsen eru eisini leikbannaðir.

Hanus Thorleifsson hevur verið so mikið skaðaplágaður, at hann ikki hevur vant í vikuni. Í gjár varð tað kortini roknað rættuliga sannlíkt, at Hanus fer at verða førur fyri at spæla í morgin.

Á positivu síðuni telur tað nógv, at liðformaðurin, Pauli G. Hansen, er farin aftur at venja. Tá ið vit frættu, var tað ikki greitt, um hann fer at spæla við í morgin, men tað er eingin ivi í, at venjarin heldur enn fegin fer at geva liðformanninum rúm á liðnum, um hann verður førur fyri at spæla.

Síðsta sunnudag var tað steinur omaná byrðu hjá NSÍ, at teir taptu 2-0 á Mølini á Eiði. Tríggir av teimum, sum hava spælt nógv í NSÍ í summar, eru skaddir ella leikbannaðir, tá ið teir fara yvir á Skála. Talan er um miðvallararnar Alexander Jovevic, sum er skaddur, og Kári Hansen, sum er leikbannaður fyri triðju ferð í ár. Dánial Hansen var hóskvøldið fyri fyrstu ferð í langa tíð til venjingar. Tað gekk so toluliga, men í Runavík ivast teir nógv í, um Dánial verður førur fyri at spæla á Skála í morgin, og um hann yvirhøvur fer at verða tøkur í teimum báðum umførunum, sum eru eftir at hesum kappingarárinum.

VB-KÍ:

# Ovi og Jákup ikki við í Vági

**Vágbingar eru so væl fyri, sum tað ber til, tá ið teir í morgin fara at taka ímóti KÍ, sum framvegis tevjar bronsuna**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



Í dag fara klaksvíkingar til Vágs. Á Vágseiði skulu teir seinnapartin í morgin royna at halda tørn um møguleikan at vinna bronsukrónurnar og harvið at enda jubileumsárið væl betri, enn tað mesta partin av kappingarárinum hevur sæð út til, at teir skuldu fara at gera.

KÍ kundi havt verið betri fyri við fólki, enn teir eru hesa ferð. Tveir av lyklaspælarunum eru burturi frá. Annar er málverjin, Jákup Mikkelsen, og hin er fremsti álopsspælarin, Ovi Nysted. Ovi er leikbannaður, og Jákup er skaddur. Landsliðsmálverjin hevur ikki vant í vikuni, og tað er rættuliga ivasamt, um hann verður tøkur, tá ið KÍ í síðsta umfarinum fer at spæla á heimavølli ímóti ÍF. Dreingjaliðsspælarin Mathias Samuelsen fer at verja málið. Frammi á vøllinum verða onkrar smávegins umskipingar. Eyðun Klakstein, sum varð tikin út eftir fyrra umfarið móti HB, verður aftur á miðvøllinum, meðan Jacob Bymar verður fluttur av miðvøllinum og fram í álopið.

Um Jákup Mikkelsen fer at verða førur fyri at fara við landsliðnum til Kypros og Írlands er framvegis ein opin spurningur, men eingin ivi er um, at Jákup ógvuliga fegin vil vera við á síðstu landsliðsferðini í hesum árinum.

KÍ hevur ikki tapt síðani í tólvta umfarinum, tá ið teir taptu stórt á Eiði. Síðani hava teir í fýra uppgerðum fingið tíggju stig. So mong stig hava í fýra teimum seinastu umførunum hava bara HB og KÍ fingið.

### Nú eru allir tøkir

Hjá VB hevur tað ikki hilnast nakað serligt síðstu tíðina. Í teimum sjey dystunum síðani summarsteðgin hava teir fingið seks stig. Tey hava teir fingið í heimasigrum ímóti NSÍ og EB/Streymi.

Nú er tað greitt, at VB skal finna sær nýggjan venjara. Hans Nielsen flytir aftur til Havnar, og í morgin fer hann fyri síðstu ferð at hava ábyrgdina av VB liðnum á Vágseiði.

Síðsta sunnudag vóru Poul N. Poulsen og Eyðun Jacobsen leikbannaðir. Teir eru báðir tøkir aftur. Allir teir, sum síðsta sunnudag vóru í Gundadali og spældu ímóti B36, eru eisini tøkir hesa ferð.

VB fer ikki úr bestu deildini, og teir hava ongan møguleika at vinna heiðursmerkir. Síðstu tíðina hava teir í Vági vant tríggjar ferðir um vikuna, men tað verður avgjørt ikki roknað við, at teir fyri tað eru verri fyri at spæla ímóti KÍ.

B68-EB/Streymur:

# Báðir partar eru heilt væl fyri

**Væl upplagda B68 er illa spert, og teir í EB/Streymi hava ikki mist mótið um, at tað skal eydnast teimum at vinna heiðursmerkir**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Báðir partar hava nógv at spæla fyri, tá ið EB/Streymur í morgin fer at vitja á Svangaskarði. Hjá B68 er einki sum eitur. Tað er alneyðugt hjá teimum at fáa stig og vinna. Tað verður neyvan minni torført hjá teimum at fáa stig í síðsta umfarinum, tá ið teir skulu spæla í Gundadali ímóti B36.

Men tað verður ikki bara sum at siga tað at spæla móti EB/Streymi. Sundalagsmenninir eru væl fyri, og teir stríðast fyri at røkka bestu endastøðuni nakrantíð. Í fjør endaði EB/ Streymur á sætta plássinum. Nú eru teir nummar fimm, og tað er framvegis møguleiki hjá teimum at røkka bronsuplássinum. Tí møguleikanum stríðast teir fyri.

Tá ið EB/Streymur síðsta sunnudag vann 2-0 á NSÍ, vóru allir spælararnir tøkir. Tað eru teir eisini hesa ferð. Sonni L. Petersen hevur í vikuni boðað frá, at hann eisini næsta ár ætlar sær at spæla fótbólt við EB/ Streymi. Álopsspælarin er saman við tveimum øðrum ovast á skjúttaralistanum, og á Svangaskarði í morgin og annan sunnudag, tá ið EB/Streymur fer at spæla á heimavølli móti Skála, fara liðfelagarnir hjá Sonna einki at hava ímóti at hjálpa honum at lyfta seg upp um kappingarneytarnar Súna Olsen, GÍ, og Rógva Jacobsen, HB. Um tað fer at eydnast, so verður tað fyrsta ferðin yvirhøvur, at EB/Streymur fer at eiga besta málskjúttan í bestu deildini.

### Einki út at geva

Hóast teir hava fingið fult tvær tær síðstu ferðirnar, so er tað framvegis soleiðis, at toftamenn eru illa sperdir í botnstríðnum. Men teir hava gott mót undan vitjanini av Eiði. Lagið verður sagt at hava verið gott undir venjing, og allir spælararnir eru tøkir. Eisini liðformaðurin Øssur Hansen, sum miðskeiðis í 2. hálvleiki ímóti ÍF noyddist at taka seg aftur, tí hann var smáskaddur.

Tá ið B68 vann á ÍF var tað fyrsta ferðin yvirhøvur í ár, at allir spælararnir hjá B68 vóru tøkir. Tá spældi Herbert í Lon Jacobsen við 3. deildarliðnum, sum við sigri á ÍF so at siga tryggjaði sær plássið í deildini.

Í tveimum teimum seinastu umførunum hevur brasiliumaðurin Anderson skorað fýra mál fyri B68. Í morgin fer at fáast at síggja, hvussu teir í EB/Streymi fara at taka sær av honum.

**1. deild menn**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 16 | 12 - 3 - 1 | 42 | 13 | 29 | 39 |
| 2 | B36 | 16 | 9 - 3 - 4 | 29 | 17 | 12 | 30 |
| 3 | Skála | 16 | 8 - 3 - 5 | 30 | 21 | 9 | 27 |
| 4 | KÍ | 16 | 5 - 8 - 3 | 22 | 20 | 2 | 23 |
| 5 | EB/Str. | 16 | 6 - 4 - 6 | 26 | 22 | 4 | 22 |
| 6 | GÍ | 16 | 6 - 4 - 6 | 26 | 28 | -2 | 22 |
| 7 | NSÍ | 16 | 6 - 3 - 7 | 24 | 22 | 2 | 21 |
| 8 | VB | 16 | 5 - 4 - 7 | 21 | 22 | -1 | 19 |
| 9 | ÍF | 16 | 3 - 2 - 11 | 21 | 46 | -25 | 11 |
| 10 | B68 | 16 | 2 - 2 - 12 | 15 | 45 | -30 | 8 |

**2. deild menn**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 16 | 10 - 2 - 4 | 41 | 22 | 19 | 32 |
| 2 | B71 | 16 | 10 - 2 - 4 | 44 | 30 | 14 | 32 |
| 3 | AB | 16 | 9 - 2 - 5 | 27 | 22 | 5 | 29 |
| 4 | FSV | 16 | 8 - 3 - 5 | 54 | 32 | 22 | 27 |
| 5 | Royn | 16 | 8 - 1 - 7 | 36 | 35 | 1 | 25 |
| 6 | LÍF | 16 | 7 - 4 - 5 | 26 | 28 | -2 | 25 |
| 7 | Sumba | 16 | 6 - 4 - 6 | 23 | 27 | -4 | 22 |
| 8 | B36 | 16 | 4 - 3 - 9 | 22 | 43 | -21 | 15 |
| 9 | KÍ | 16 | 3 - 3 - 10 | 26 | 35 | -9 | 12 |
| 10 | VB | 16 | 1 - 4 - 11 | 16 | 41 | -25 | 7 |



ÍF-B36

# Silvur og niðurflyting

**Bæði liðini hava sítt at stríðast fyri, tá farið verður á vøllin í Fuglafirði sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Bæði ÍF og B36 hava sítt at stríðast fyri sunnudagin*

Tað stendur einki til við fótbóltslagnum í Fuglafirði fyri tíðina. Tapið fyri B68 seinast bar við sær, at tað nú bert eru trý stig niður til botnsessin, og við innanhýsis roknskapinum móti B68 í huga er nú av álvara farið at stramma í hjá ÍF.

Tí er einki at ivast í, at fuglfirðingar fara eftir í øllum førum øðrum stiginum, tá B36 vitjar.

- Um vit tapa, so fáa vit so ikki gjørt nakað sjálvir, uttan at vóna tað besta. Fáa vit hinvegin javnleik, so kunnu vit framvegis bjarga okkum uttan hjálp frá øðrum, so tað er tað, sum vit fara eftir, sigur Hanus Eliasen, sum í ár hevur gjørt nógv um seg hjá ÍF.

Og í øllum førum, so fáa fuglfirðingarnir sent sterkastu manningina á vøllin. Viggo Johannesen var leikbannaður seinast, men hann er tøkur aftur hesaferð.

### Silvurið

Hjá B36 er tað silvurið, sum nú stendur upp á spæl, og hetta ætla teir ikki skal gleppa teimum av hondum.

- Tá tað nú ikki gekk við gullinum, so mugu vit fara eftir tí næstbesta, og tað krevur so fýra stig afturat, sigur John Petersen, sum hesa ferð spælir sín næst seinasta dyst við B36, áðrenn kósin verður sett móti Danmark.

John er annars hálvur fuglfirðingur sjálvur, men tað tykist tó ikki, sum leggur hann ov nógv í hetta, nú hann kann vera við til at geva ÍF eitt stórt skump skeiva vegin.

- Tað kanst tú ikki hugsa um, tá farið verður á vøllin. Vit spæla fyri at vinna, og tað gera teir helst eisini, heldur hann.

B36 tykist annars vera væl fyri við fólki til dystin. Bárður Mortansson er farin til Onglands í útbúgvingarørindum, men í aðrar mátar eru allir mans tøkir. Eisini Allan Mørkøre og Alex dos Santos, sum vóru leikbannaðir seinast.

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| *Dagur* | *Dystur* |
|---|---|
| 26.09 | Skála-NSÍ |
| 26.09 | HB-GÍ |
| 26.09 | VB-KÍ |
| 26.09 | ÍF-B36 |
| 26.09 | B68-EB/S |

**2. deild menn**

| | |
|---|---|
| 25.09 | LÍF-FSV |
| 25.09 | AB-Sumba |
| 25.09 | Royn-TB |
| 25.09 | VB-B36 |
| 25.09 | B71-KÍ |

**3. deild menn**

| | |
|---|---|
| 26.09 | HB-GÍ |
| 26.09 | Skála-NSÍ |
| 26.09 | TB-SÍ |
| 26.09 | ÍF-Fram |
| 26.09 | B68-EB/S |

## Taptu finaluna

Teir tríggir føroyingarnir, sum spæla við unglingunum hjá Frem, Bogi Hermansen, Jónas Tór Næs og Gunnar Nielsen, vóru mikukvøldið partur av steypafinaluni hjá KBU (Københavns Boldspil Union) fyri unglingar, sum stóð millum Frem og KB.

Frem var á odda 1-0, men í seinna hálvleiki eydnaðist KB at javna, soleiðis at longd leiktíð skuldi til. Her eydnaðist KB at skora, tá einans fimm minuttir vóru eftir, og so máttu Frem og føroysku leikararnir taka til takkar við silvurmerkjunum. *-jm*

# Smádreingjadeildin á skrivaraborðinum

**Ein heldur margáttlig lógarorðing er atvoldin til, at kappingarnevndin nú skal taka støðu til oddasessin í smádreingjadeildini**

FÓTBÓLTSLÓGIR
*Jákup Mørk*

Kappingarnevndin hjá FSF skal undan vikuskiftinum taka støðu til ein heldur løgnan spurning.

Í smádreingjadeildini er støðan nevnliga tann, at tað væl er hugsandi, at meistarin skal finnast á skrivaraborðinum, tí ein regla, sum á sinni er gjørd í kappingarreglunum, ger tað ivasamt, hvussu farast skal fram.

Reglan er tó ikki at finna í kappingarskipanini fyri 20040, men hon er heldur ikki broytt á aðalfundinum, og so er spurningurin, hvørt reglurnar frá 2003 framvegis eru galdandi.

### Stigini telja ikki

Málið snýr seg í stuttum um, hvussu farast skal fram við teimum stigum, sum lið vinna sær, ið koma úr økisbólkunum til meistarabólkin.

Her hava gomlu reglurnar verið, at liðið, sum vinnu grundspælið í meistarabólkinum, fær trý stig við sær til endaspælið, og tað gjørdust í ár runavíkingar. Samstundis verður staðfest, at lið, sum vinna økisbólkarnar og soleiðis kemur til meistarabólkin, skal hava eitt stig við sær, og hetta liðið varð í ár KÍ.

Sum so ein ógvuliga greið regla. Men tá tað so kortini verður staðfest, at hesi stig ikki skulu verða avgerandi fyri meistaraheitið, so verður alt meira fløkt. Hjá smádreingjunum er støðan nú nevnliga hon, at NSÍ er tvey stig undan KÍ, men tá talan er um júst tey bæði stigini, sum KÍ hevði meira við byrjan av endaspælinum, eiga hesi at detta burtur eftir gomlu reglunum.

Spurningurin, sum tey bæði í Runavík og í Klaksvík í hesum døgum seta sær, er tí, hví hesi stigini yvirhøvur verða givin. Ivaleyst er tað so, at stigini verða latin vinnaranum í grundspælinum, soleiðis at hesi liðini hava nakað at stríðast fyri í grundspælinum, soleiðis at dystirnir tá ikki gerast líkasælir.

Samstundis er valt, at vinnararnir av økiskappingini fáa eitt stig, fyri at hesi ikki skulu standa heilt á berum, og sum so er tað eisini væl skiljandi.

Stóri trupulleikin hevur helst verið, at eingin hevur ímyndað sær, at lið skal koma úr økiskappingini, og so yvirhála hini liðini, men tað er so júst tað, sum KÍ hevur gjørt. Og so kann nevnast, at VB í dreingjadeildini gjørdi tað sama fyri tveimum árum síðani, so heilt ókunnugt er tað tó ikki.

Hvørja støðu kappingarnevndin so kemur til, er ilt at meta um, men sum skilst, so skuldi tann avgerðin altso takast fríggjadagin.

# Flogbólturin aftur í gongd



*umboð fyri FK og Fleyr hava júst undirskrivað avtaluna um ársins útgávu av FK-kappingini*

Sum vant byrjar flogbóltsárið við stóru FK-kappingini í Havn Hesaferð hava 36 lið hjá monnum og kvinnum teknað seg til kappingina, har vinnarin eisini tryggjar sær annað plássið í steypafinalunum, sum verða leiktar á vári.

Tað eru aftur í ár Fleyr og Føroya Keypssamtøka, sum standa fyri kappingini, sum fer fram í Gundadalshøllini og í Hoyvíkarhøllini.

*-jm*

# Grundskeið í flogbóltsvenjing



*Á myndini er Jan Pilsmark, niðast uttast til høgru, saman við skeiðlutakarunum*

**Seinasta vikuskifti skipaði Flogbóltssamband Føroya fyri venjaraskeiði í Hoyvíkshøllini og skúlanum í Hoyvík**

VENJARASKEIÐ
*tíðindaskriv*

Høvuðsvenjari var danin Jans Pilsmark, sum var í Føroyum á 7 sinni, í sambandi við venjaraskeið fyri Flogbóltssambandið. Fyriskipari í Føroyum var Klæmint Isaksen, sum hevur venjaraskeiðini undir hond fyri FBF.

Talan var um venjaraskeiðini T1 og T 2, sum eru grundskeiðini í venjaraútbúgvingini hjá danska flogbóltssambandinum, og hava nógv fólk verið ígjøgnum hesi her heima í Føroyum.

Umhugsað verður tí nú, at fara at skipa fyri einum skeiði á hægri støði í vár, tí tað nú eru so nógv sum hava tikið grundskeiðini.

Klæmint Iskasen hevur nú í 3-4 ár skipa fyri skeiðunum, og hevur luttøkan altíð verið góð, og tí er ætlanin at halds áfram við hesum tiltøkum.

Vanligt er at skeiðini T 3 og T 4 eisini kunnu takast í Føroyum, men higartil hevur verið neyðugt at farið til Danmarkar um ein ætlar sær víðari í útbúgvingini, men miðja verður ímóti, at fáa so nógv ígjøgnum T 3 og T 4 eisini, at grundarlag er fyri at skipa fyri hægru skeiðunum í Føroyum eisini.